# Skemt



MYND: POLFOTO

## Rættir menn

Rættir menn ræðast ikki kava, frost og ís. Nei, nei, tú! Teir standa á høvdinum og leypa út í ísvatn, nær tað skal verða. Her er tað 73 ára gamli Xiao Ying, sum er á veg út í ein hyl í útnyðringspartinum av Kina.



MYND: POLFOTO

## Ger ein Sundstein

**Hví kann ikki onkur gera ein ordiligan kavamann í Føroyum – soleiðis sum tey gera í Kina. Her tað Mao Zedong, sum er endaður sum kavamaður – ella kavafjes. Upplagt at gjørt ein slíka í Føroyum, og hvør annar enn Jógvan Sundstein skuldi verið kavamaður?!**



MYND: POLFOTO

## Forherðaður munkur

Herligt at síggja, at ikki allir teir buddistisku munkarnir eru líka disiplineraðir. Her tað ein ungur munkur í India, sum hevur fingið ein ís og sær út til at njóta hann. Ja, tað er líka við, at hann kundi verið lagdur undir illgruna fyri at hava gjørt onkra balladu.

## Í RANGASTRÚPAN

**Altso, fleiri fólk og meira pengar?**
Granskarar í Føroyum hava brúk fyri netverki
*Kringvarp.fo*

**B36 í fisk**
Meinhardt Jacobsen hevur skrivað undir tvey-ára sáttmála við B36.
*B36.fo*

**Í hvørjari ítróttargrein?**
Handverkararnir á odda
*Dimma*

**Ja – fyrr ella seinni...**
Gary Neville fer at gevast
*Portal.fo*

**Nýtt, nýtt!**
Øll liðini kappast um finalupláss
*Kringvarp.fo*

**Hvør er hann?**
Hoyvíkingur fingið heimstað á Argjum
*Kringvarp.fo*

**Nú má okkurt gerast við trygdina**
Tingmaðurin fekk sína høglbyrsu
*Dimma*

**Mr Sandoy má vera Gerhard**
Miss Sandoy skal finnast
*Olivant.fo*

**Hvat mundi henda?**
Heitasta nátt í 108 ár
*Dimma*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Fundarsótt

Bengt Göransson eitur svi, sum eg kenni, og nógvir aðrir føroyingar eisini kenna.

Hann var mentamálaráðharri í Svøríki, sosialdemokratur. Hann var formaður í svenska norrøna felagnum, meginfelagnum, og hann var formaður í stýrinum fyri Norðurlandahúsið í Føroyum.

Skilafólk, skal hann lýsast við einum orði.

Bengt Göransson er eitt av hesum fólkunum, sum øll lurta eftir, tí tey altíð, altíð, siga okkurt skilagott, tá tey taka orðið á fundum ella aðrastaðni.

Bengt Göransson dugur væl at taka samanum, hann er lítillátin, einki hóvasták, meira at kalla spakmæltur, eingi róp, eingi stór lýsingarorð. Siðiligur, humoristiskur, avgjørdur og klókur.

Langt, ja, næstan ein ævinleiki er millum slík fólk, so tað er ein gáva at kenna onkran av teimum fáu, sum eru.

Minnist so sera væl ein fund, har sum Bengt Göransson var við. Hann segði einki á fundinum. Tað undraði ein annan fundarmann og helst onnur við. Men hesin eini var so ørkymlaður, at hann beint eftir fundin spurdi Bengt, hví hann ikki segði nakað á fundinum, hví hann ikki var við í kjakinum.

Tá svaraði Bengt sum bara hann kann svara og við sínum eyðkenda vinarliga skálkabrosi:

»At lurta er eisini at vera við.«

Hesin er ein av teimum setningum, tú ongantíð gloymir, tí tað er so væl sagt, so øgiliga væl sagt.

At vera á fundum, har sum fólk sum Bengt Göransson eru við, eru livilig kor at bjóða fundarfólki.

Men annars, annars, Gud forbarmi seg, eru fundir ein ósiður, ein plága. Ein ósiður, og føroyingar duga ikki fundarsið.

Á fundum í Føroyum rópa øll í senn um alt í senn. Eingin stýring, heldur ikki á tí, tey so hátíðarliga rópa landsins hægsti røðarapallur.

Eg havi verið á nógvum fundum uttanlands. Teir eru sjáldan spennandi. Men har verður eitt evni viðgjørt í senn til tað er liðugt og niðurstøða gjørd. So verður farið til næsta evni í fundarskránni. Ein hevur orðið í senn, fólk biðja um orðið og taka ikki orðið, fyrr enn fundarstjórin gevur teimum orðið. Slíkt kallast fundarsiður.

Í Føroyum ræður bara um at rópa sum harðast og ikki anda, tí so kemur onkur annar uppí og rópar harðari. Í somu løtu, fólk draga andan, er orðið, sum tey ongantíð hava fingið, mist.

Sjálvandi er orðið frítt. Men tað skal valdast. Orðið er frítt hjá einum í senn.

Tað eru so nógv fólk, sum elska at hoyra seg sjálvan og harafturat onga løtu ivast í, at tey eru so ótømandi klók. Fyri at øll vit onnur kunnu fáa part í hesum vísdómi, fara tey á fund í heilum. Og boða til fundarboð.

Føroysk fundarboð eru eisini ein søga fyri seg. Sjáldan er nøkur fundarskrá við. Fundur er klokkan eitt um hatta. Klokkan eitt, og so byrjar fundurin í fyrsta lagi klokkan tíggju minuttir í hálvgum tvey.

Fundir eru ein drepandi plága. Verri enn handan heimsfarsóttin, sum vit framvegis bíða eftir.

Men nú eigur at bera til at sleppa undan fundum. Nú hava vit teldupost og facebook og alt hatta har nýggja. Har kunnu fólk skriva sum teimum lystir, øll í senn. Og tey, sum tíma tað og orka og leggja í, kunnu lesa alt tað, sum tey sjálvi skriva og øll hini skriva. Tey kunnu lesa tað, tá tey hava hug. Uttan at larmandi fartelefonir órógva. Góður fundarsiður er at sløkkja fartelefonina á fundum. Ella fólk órógva, sum fara út at roykja. Góður fundarsiður er at hava roykipausur. Men, sum sagt, føroyingar duga ikki góðan fundarsið.

Tað ber til at sleppa undan fundum. Við at skriva við stórum stavum í staðin fyri at rópa.

Tí at lesa er eisini at vera við.